# Minnislisti til skúlar og stovnar um nýtslu av myndum og upptøkum

Reglurnar eru tær somu fyri myndir og upptøkur

## Hav skil á trygdini



- Set kotu á eindina
- Brongla (kryptera) eindina
- Goym ikki kotir nær við eindina
- Ger yvirlit yvir eindir, ið tit goyma myndir á, og hvør hevur atgongd til eindirnar
- Starvsfólk skulu nýta telefonina ella eindina hjá stovninum at taka myndir við og ikki sína egnu
- Kanna um appir og kt skipanir eru tryggar, at tær ikki nýta myndir og upptøkur til egin endamál, sum tit ikki ráða yvir

**Tak støðu til, hví tit ynskja at taka myndir, og hvat tit ætla at nýta myndirnar til, og avmarka nýtsluna til tað**

## Nýtsla og strikan

**Strika støðumyndir aftaná 2 – 4 vikur, gjarna sjálvvirkandi**

- Myndir av børnum skulu helst ikki á alnetið
- Tit kunnu deila á lokaðum innanneti og við viðkomandi t.d. foreldrini hjá flokkinum, ikki allan stovnin
- Tak meinaleysar myndir, og ikki av børnum ella starvsfólki í keðiligum støðum, sum t.d. tá tey gráta
- Strika myndirnar, tá tær hava tænt sínum endamáli. Um tær bara skulu nýtast til at geva foreldrunum innlit í gerandisdagin hjá børnunum t.d. umvegis tykkara innannet, eiga tit at strika myndirnar aftaná 2 - 4 vikur, gjarna sjálvvirkandi
  Foreldrini kunnu heinta myndirnar av innannetinum, um tey ynskja at goyma myndirnar



- Strika myndirnar javnan av telefonini ella tí eindini, sum teir blivu tiknar
- Er myndin, eins og myndirnar á hesum minnislista, tiknar, so tað ikki ber til at eyðmerkja persónarnar á myndini, er talan ikki longur um persónupplýsingar, og ein nýtist ikki at strika myndina

## Lógligt uttan samtykki, tá ið myndir av barninum:

**Ver varin við at leggja myndir á alnetið**

- eru partur av námsfrøðiliga arbeiðinum
- eru á uppslagstalvu, skíggja og foreldrainnanneti fyri at geva foreldrunum innlit í gerandisdagin
- eru á klædnarúmi, amboðskassa og hanga uppi í hølunum
- verða tiknar av myndatakara, og hetta verður fráboðað áðrenn
- verða nýttar til myndabók til barnið, tá tað gevst á stovninum